# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Óli Holm 60 ár



Í dag, fríggjadagin 15. apríl, verður Óli Holm í Vági 60 ár. Hann er fyrrverandi landsstýrismaður í mentamálum, og hann hevur seinasta árið verið formaður í Fótbóltssambandinum.

Óli er vágbingur. Pápin var Alfred Holm ella Alfred hjá Juliusi við Kykslið, sum hann varð nevndur, og Elsa, født Larsen og ættað av Eiði. Pápi hennara var Óli í Búrsstovu á Eiði, sum gekk burtur við Verdandi í 1944. Óli eitur sostatt eftir abbanum á Eiði.

Elsa og Alfred fingu sjey børn: Jona, Marna, Óli, Elsubeth, Julius, Magnus og Maibritt. Marna, Óli, Elsubeth, Julius og Magnus búgva í Vági. Jona býr í Herfølge, og Maibritt býr á Oyri.

Tá ið Óli í 1961 var liðugur í skúlanum, varð hann skipsmaður. Hann sigldi við teimum á Gørðunum, har pápin var skipari. Óli var saman við pápanum við Saksabergi og Magnusi á Gørðunum, og so var hann eisini við Peturi á Gørðunum.

Eftir summarfrítíðina í 1963 fór Óli at útbúgva seg til lærara í Danmark, har hann í 1968 leyk prógv á Nr. Nissum Seminarium. Hann gjørdist beinanvegin lærari við Vágs skúla, og har hevur hann verið síðani, tó undantikið 1971-73, tá ið hann var lærari í Sct. Jørgen skúla í Holsterbro. Síðani 1973 hevur Óli verið varaskúlastjóri í Vági.

Í 1992 varð Óli, sum er fyrikomandi og hóvligur maður, valdur til formann í aðalstjórnini í Tjóðveldisflokkinum, og í tí sessinum sat hann í tíggju ár. Frá 14. juni í 2001 og fram til 6. juni í 2002 var hann landsstýrismaður í mentamálum.

Óli hevur verið nógv uppi í ítrótti. Hann er góður bridge spælari og serliga í fótbóltinum hevur hann gjørt vart við seg. Hann var á VB liðnum, sum vann miðaldeildina í 1964. Í 1966 helt VB seg til aftur at spæla í meistaradeildini, og Óli var á liðnum fram til í 1979. Fyrru árini var hann ofta vongur. Í 1974 vann VB bæði kappingina um Ísafjarðarsúluna og Felags steypakappingina, sum bara var hetta eina árið. Tá og tey næstu árini var Óli miðvallarspælari, og síðstu árini var hann aftastur í verjuni.

Frá 1969 og fram til 1971 var Óli formaður í VB, og seinni hevur hann verið VB formaður í eini fýra ár afturat. Tað var í tí tíðini, tá ið vágbingar bygdu VB hús og ítróttarhøll. Óli var formaður í hallarnevndini. Í 1985 varð Óli Holm valdur í nevndina í Fótbóltssambandinum, og har hevur hann sitið síðani. Fyri einum ári síðani varð hann valdur til formann í FSF.

Óli er giftur Elise Holm úr Vinding í Danmark. Tey bæði gingu í lærarskúla saman, og síðani í 1973 hava tey verið starvsfelagar í Vágs skúla. Elise og Óli Holm búgva vesturi í Bø í Vági, og tey eiga fýra børn - John Henrik, føddur í 1970, Dennis, føddur í 1972, Christina, fødd í 1973, og Barbara, sum er fødd í 1986. Øll børnini búgva í Vági, og Óli eigur fýra abbabørn - tríggjar gentur og ein drong.

Føðingardagin er Óli Holm burturstaddur.

## Vígdis Finnbogadóttir 75



Í dag, fríggjadagin 15 april, fyllir fyrrverandi íslendski forsetin Vigdís Finnbogadóttir 75 ár. Vígdis er fødd í Reykjavík 15. apríl 1930. Hon var fyrstu ferð vald til forseta í Íslandi í 1980, og vald aftur í 1984 og í 1988. Vígdis var ein av fremstu fyrireikarunum av Norðuratlantsbryggjuni, og varð hon sett sum fyrsti leiðarin har.

**75 ára føðingardagur**
Sunnudagin 17. apríl verður Klæmint Nónklett, Lamba, 75 ár. Kaffimuður verður uppi í Toft í Søldarfirði eftir kl. 15.00.

Karl Marius Poulsen og René Jensen:

## Keypt Barok og Fortuna í Klaksvík



*René Jensen (v.m.) og Karl Marius Poulsen hava keypt diskotekið "Barok" og matstovuna "Fortuna" í Klaksvík*

*Mynd: Bárður Lydersen*

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 9. apríl 2005 var móttøka í samband við at Karl Marius Poulsen og René Jensen í Klaksvík hava keypt bygningin við diskotekinum "Barok" og matstovuni "Fortuna" við Klaksvíksvegin í Klaksvík frá Michael Olsen, sum hevur rikið fyritøkurnar í bygninginum seinastu árini. Ein partur av bygninginum verður leigaður út til Pizza 67.

Karl Marius sigur, at hann og René í fleiri ár hava tosað saman um at byrja okkurt sjálvstøðugt virksemi, og tá so hesin møguleikin kom, tóku teir av.

Teir koma at reka virksemið á sama hátt sum frammanundan, men seinni er ætlanin at hava meira opið. Sum nú er, er diskotek fríggjakvøld og leygarkvøld. Eisini verða onkrar broytingar í atgongumerkjaprísinum, sum t.d. er broyttur til 50 krónur fríggjakvøld, men leygarkvøld er prísurin framvegis 80 krónur. Komandi fríggjakvøld verður Christian Joensen DJ. Leygarkvøldið 16. apríl skipar "PhaFalAion" fyri diskotekinum.

**Dagurin**
**15. apríl**. Tær ljósu næturnar byrja. Fyrr stóð navnið Olympia í álmanakkanum til minnis um halga konu, sum varð tikin av døgum umleið ár 250 í Persiu.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá okkara elskaða kona, mamma, omma og langomma

**Jensia K. A. Christensen**

doyði og fór til gravar.

Takk fyri blómur og kransar.

*Familjunnar vegna*
**Simon**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt,
sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara góða
mamma, vermamma, omma, langomma, systur
og svigarinna

**Margit Dam**
**Húsavík**

fór heim til Harran.

Takk til Jákup R. Hansen, prest, fyri hjálpsemi
og troystarrík orð bæði í kapellinum og í kirkjuni.
Hjartaliga tøkk til tykkum øll á Gerðisgarði, sum vóru
so góð við hana, meðan hon var har.
Tøkk til starvsfólkið á B7 á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk til tykkum øll, sum komu í kapellið.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravarar.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Gerðisgarð.
Hjartans tøkk til tykkum, sum veittu stóra og góða
hjálp við ervinum, og øll tit, sum rættu okkum
eina hjálpandi hond.
Tøkk øll somul, sum fylgdu mammu okkara
til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jóhanna Sofía, Jens Pauli, Høgni og Súsanna**